# Reyðu telefon-boksirnar

Mentanarligar ímyndir eru lutir ella myndir, sum verða settar í samband við fólk ella støð. Fyri mong eru reyðu telefonboksirnar ímyndin av London og Onglandi. Tíverri gerast færri og færri av hesum eyðkendu telefonboksunum til, stutt sagt tí brúk er ikki fyri teimum longur. Í dag finnast bara 12.700 reyðar telefonboksir í bretsku býunum, og tær, sum standa uppi enn, gera tað meiri av nostalgi heldur enn tí tær verða brúktar. Og orsøkin er púra greið: Tað eru í dag fleiri fartelefonir í Bretlandi enn tað eru fólk. Reyðu telefonboksirnar eru so enskar sum nakað kann verða, og helst fara konservativu onglendingarnir at lata nakrar av hesum sermerktu reyðu telefonboksunum verða standandi, fyri á tann hátt at varðveita eitt petti av søguliga Onglandi. Og sum nevnt ber enn til at síggja tær runt um í landinum.






















